Góðu borgarar í Sørvágs kommunu!
Tíðin rennur sum streymur í á, sigur sálmaskaldið Fríðrik Petersen. Hetta má bert ásannast. Er tað rákið í tíðini, sum tekur ræðið? Eru vit tilvitað um, hvønn veg tað ber?
Ynski okkara er, at vit í nýggja árinum steðga á eina løtu og seta spurning við tilverugrundarlag okkara.
Vit hava øll ábyrgd fyri okkara næsta, teimum gomlu, teimum ungu og teimum minni mentu.
Lat okkum í nýggja árinum taka tøk saman næsta okkara at gagni!

Heimasíðan www.sorvag.fo nógv vitjað
Alnetið hevur verið ein virkin miðil hjá Sørvágs kommuna seinasta hálvtannað árið.
Hesa tíðina hevur heimasíðan verið vitjað einar 70.000 ferðir, og tað meta vit vera sera nógv.
Heimasíðan er vorðin ein góður kunningarmiðil. Tað kann tí hugsast, at tørvurin og týdningurin á tí kunningarskrivi tygum hava í hondini, í framtíðini verður avmarkaður og kanska als ikki neyðugur. Ístaðin kann ganga tann vegin, at slík kunning verður løgd út á heimasíðuna. Alt fleiri húski hava netsamband. Netið verður tí ein alt vanligari miðil hjá fólki at brúka til at fáa sær kunning.
Heimasíðan hevur eina úrslitagóða ávirkan á áhugan, fjølmiðlarnir fáa fyri kommununi. Tíðindi frá kommununi, løgd út á heimasíðuna, verða oftast borin sum tíðindi í stóru fjøl-miðlunum - bæði bløðum og loftmiðlum.

Mykines
Arbeiðið at gera reinsiverk til drekkivatnið í Mykinesi verður væntandi liðugt komandi ár.
Roynt verður at finna eina skipan við goymslu og flutningi av gassolju til nýtslu hjá sethúsunum. Roknað verður við, at henda skipan fer at virka í ár 2007.

Ein gøtunavnanevnd hevur arbeitt við at seta nøvn á vegir og tún í Mykinesi. Hetta arbeiðið er um at verða liðugt. Móti sumri kann væntast, at skeltir verða sett upp, sum vísa nøvn á vegum, gøtum og túnum.

Gásadalur

Gásadalstunnilin er nú alment tikin í nýtslu. Hetta gevur góðar møguleikar at ferðast til og úr bygdini. Til ber nú hjá fólki at búgva í Gásadali og hava arbeiðið aðrastaðni í landinum. Kommunan eigur nøkur grundstykkir í Gásadali. Væntandi verða hesi klár at selja í 2007. Tað er okkara vón, at fólk fara at flyta til Gásadals at seta búgv, so fólkatalið økist, og at hesi fara at fjálga um bygdarmyndina. Kommunan arbeiðir eisini við at skapa møguleikar fyri at byggja summarhús longri uppi í Dalinum.

Bøur

Áhugin fyri at seta búgv í Bø er vaksandi. Væntandi verða fleiri sethús bygd har næstu ár-ini. Kommunan hevur tikið stig til at víðka um byggiøkið og fer í næstum at útstykkja nøkur grundstykkir sambært galdandi byggiætlan.

Nýstovnaða bygdarfelagið "Býggjarbati" hevur ætlanir um at fríðka í bygdini. Hesum tekur kommunan undir við, og ætlar bygdarráðið at stuðla tiltakinum í tann mun, tað ber til.

Sørvágur

Í Sørvági hevur verið nógv vegaarbeiði seinasta árið. Hetta hevur órógvað ferðsluna í bygdini, men biðja vit borgarin bera yvir við hesum. Vit verða glað, tá vit síggja úrslitini. Fleiri av arbeiðunum halda fram í komandi ári, umframt at onnur arbeiðir verða sett í verk.

Bygdarráðið hevur samtykt gera vegastrekki liðug, sum í fleiri ár hava ligið í hálvum gekki.

Fleiri av teimum ætlanum, sum bygdarráðið setti sær fyri at fremja í 2006, eru framdar. Hetta gevur okkum møguleikar at arbeiða við nýggjum ætlanum fyri 2007.

Komandi ár verða stór átøk gjørd fyri at útvega byggilendi til fleiri sethús í Sørvági. Hesar ætlanir fara væntandi at nøkta tørvin á byggiøki næstu árini.

Vetrarfriðing

Eftir samráðingar í mong ára eru vit nú komin á mál við ætlanini at vetrarfriða Sørvágs bygd. Farið verður undir at hegna í vár. Tá ið arbeiðið er liðugt, ber til at gróðurseta trø og runnar. Planta blomstur og seta niður epli ella annað, uttan at skula girða seg inni við høgum hegni ella garði.

Ætlandi skal umsitingin hjá kommununi saman við trivnaðarnevndini og fólki í bygdini skipa fyri gróðurseting og planting, tá seyðurin er farin av bønum í vár.

Eldraøkið

Sørvágs kommuna hevur seinasta árið arbeitt fram ímóti at geva teimum eldru betri bústaðarkor í kommununi. Arbeitt hevur verið við at gera eitt eldrasambýli í Sørvági.

Landsstýrið játtaði tíðliga í ár at bera raksturin av heiminum. Tvær byggiætlanir hava verið frammi um, hvar byggjast skal. Onnur ætlanin er ovarlaga í Úttriðingsbønum, og hin er niðri í gomlu bygdini.

Ætlanin, sum í løtuni hevur størstan áhuga í bygdarráðnum, er tann niðri í gomlu bygdini. Hetta er ein ætlan, sum Árni Winther, arkitektur hevur gjørt uppskot til.
Sørvágs kommuna fekk høvi saman við arkitektinum at vísa ætlanina fram á ráðstevnuni, sum var í Norðurlandahúsinum í novembur mánaða. Fleiri á ráðstevnuni, har ímillum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, høvdu á orði, at ætlanin var nýhugsan á eldraøkinum, sum lætt kundi gerast ein fyrimynd fyri framtíðar útbygging á hesum øki í Føroyum.

Sørvágs kommuna skal komandi ár taka støðu til, hvussu víðari skal farast fram við hesi ætlan.

Alvalon
Dagstovnurin Alvalon lat upp mánadagin 28. august 2006, og vóru tá 112 børn innskrivað í barnagarðin, vøggustovuna og frítíðarskúlan.
Dagstovnurin er skipaður í eindum, sum eru tvær vøggustovur, tríggjar barnagarðsstovur og ein frítíðarskúli.
Alvalon hevur tvørfagligt samstarv við musikkskúlan í Sørvági. Hvønn mánadag koma Katrin Jørgensen og Katrina Petersen úr musikkskúlanum at syngja og spæla saman við teimum 6 ára gomlu børnunum. Eftir at vit hava fingið ljóðføri, eru tær eisini farnar undir at læra børnini at spæla tónleik.
Í Bø verða 7 børn ansaði í dagrøkt í skúlanum.

Niðarivegur
Seinastu mánaðirnar hevur einsamallur maður staðið á Niðaravegi og laðað. Andrias Jacobsen, ið er leyningur, hevur við hepnari hond laðað framvið ovara borði á Niðaravegi. Samstundis, sum laðað verður í ovaru síðu, verður vegurin breiðkaður og nútímansgjørdur.
Ætlanin er, at Andrias skal laða heim til, har áður posthús var. Hetta er ein stór verkætlan, sum kemur at taka nøkur ár. Í hesi ætlan er eisini at gera gongubreyt – strandpromenadu – á niðaru síðu, t.e. út móti sjónum.

Skúlin
Seinasta varð bøtt um telduútbúnaðin á skúlanum, umframt at fleiri smærri umvælingar vórðu gjørdar. Í 2007 verður elsti parturin av núverandi Sørvágs skúli 50 ár. Bygdaráðið er av tí áskoðan, at hugt eigur at verða eftir, hvussu ein framtíðar skúli hjá okkum skal síggja út. Tí ætlar kommunan saman við serfrøðingum at fáa kannað og tikið støðu til, hvat eigur at verða gjørt við skúlaviðurskiftini.

Drekkivatn
Bygdaráðið kann við nøgdsemi vísa á, at tey tiltøk, sum eru gjørd til at útvega reint og gott drekkivatn í Sørvági.
Royndir eru tiknar av drekkivatninum í Sørvági, eftir at reinsiverkið varð tikið í nýtslu, og vísa hesar kanningar góð úrslit.

Brunamál
Fyri jól kom nýggi brandbilurin, sum vit leingi hava bíðað eftir. Serfrøðingar innan bruna- og bjargingartænastu meta, at bilurin er sera framkomin - ein góð íløga í trygdina í kommununi.
Bilurin, sum Sørvágs kommuna hevur keypt, er ein Volvo fm9 frá VR-Bilum í Havn. Bilurin er riggaður til hjá "Rosenbauer" í Eysturríki og hjá HMK Ringe Karrosseri í Ringe í Danmark.
Fyrst í januar mánaða fer sløkkiliðið at hava venjingar við nýggju útgerðini.

Havnarøkið og bátahylurin
Eins og árini frammanundan hevur Sørvágs kommuna í skjótt farna ári gjørt ábøtur á havnarlagnum. Mest sjónliga átakið eru sera snotiligu egningarskúrarnir, ið Berg Rasmusen, byggimeistari, hevur smíðað. Skúrarnir verða væntandi lidnir og klárir at taka í nýtslu í februar mánaða, og verða umstøðurnar tá so góður, sum tær kunnu hugsast. Talan er um níggju skúrar.
Í bátahylinum eru eisini ábøtur gjørdar. Keyptir vóru 12 nýggir brúgvararmar, og eru teir, ið mest trongdu til tað, skiftir. Í komandi ári er ætlanin at keypa fleiri armar. Í fleiri ár hevur verið tosað um at gera laðingina í bátahylinum lidna, og nú eru støða tikin til, at hetta verður gjørt í komandi ári.
Teir nýggjastu bátarnir eru so stórir, at teir ikki kunnu liggja í bátahylinum undir verandi umstøðum. Tí hevur kommunan tikið stig til at betra um umstøðurnar í Pierholinum.Her er ætlanin, at pláss skal verða fyri teimum størru bátunum.
Hóast skipafloti okkara fyri góðum árið síðani minkaði ógvusligt, hevur fitt av virksemið verið á havnarlagnum. Landingarmiðstøðin hevur í ár tikið ímóti uml. 6.000 t., og er hettar á leið tað sama sum árið frammanundan. Í árinum keypti

felagið Húsadalur trolbátin Gáshólm. Ólavur Petersen er soleiðis byrjaður reiðaravirksemi av nýggjum.Vit ynskja teim-um góða eydnu við virkseminum.
Arbeiðið í Smiðjuni úti á Bakka er nógv vaksið seinasta árið. Tað eru ungar virkisfúsar arbeiðskreftir, kvinnur og menn, við Bári og Tummasi Henriksen á odda, sum standa fyri felagnum Vest Mek. Umframt alt vanligt smiðjuarbeiði, hevur felagið seinastu vikurnar gjørt stórt umvælingararbeiði umborð á trolaranum "Rocamador", sum liggur á Sørvági.
Á P/F Nofa hava eini 8 fólk starvast í ár. Hóast virksemið ikki hevur verið av tí mesta, hevur virkið framleitt 1200 tons av upsa. Mett verður, at útlitini fyri framleiðsluni eru ljósari nú.

Aling aftur á fjørðinum
Eftir at alivinnan var fyri stórum bakkasti, er vinnan við at koma fyri seg aftur á fjørðinum. P/f Luna, sum hevur sett smolt út á fjørðin, fæst eisini við at ala laks í Miðvági og í Gøtu. Luna keypti gamla "Sørvágs Laks" frá kreditorunum.
Dagliga virksemið við alingini er flutt út á endan á bryggjuni. Tí eru uml. 40 m. av bryggjuni avbyrgdir fyri at verja ímóti fiskasjúkum. Væntandi fer p/f Luna undir at taka laks í mai. Tá verður vónandi enn meira virksemi á bryggjuni.

Vága floghavn
Nú - langt um leingi - eru útlit fyri, at flogvøllurin verður útbygdur. Slíkt útbyggingar-virksemi kemur at verða rættuliga viðkomandi fyri Sørvágs kommunu, bæði á tí tekniska og á tí praktiska økinum. Vónandi skapar hetta eisini eina menning á tí vinnuliga økinum.
Vit fara - í tann mun tað ber til - at gera okkara til, at tær avgerðir, ið tiknar verða og úrslit við, fara at verða kommunu okkara at gagni.

Ídnaðarøkið
Fyri jól varð farið undir at planera ídnaðarøkið á Vørðufelli vestan fyri bygningin hjá Landsverki. Økið er 21.000 fermetrar stórt. Ætlanin er at gera økið byggibúgvið, og síðani at selja ella leiga grundøkir. Nakrar umsóknir eru longu um byggiøki, og væntandi verða fleiri, tá økið verður byggibúgvið. Roknast kann við at farið verður undir at byggja fyrstu bygningarnar í 2007. Vit vóna, at nýggja ídnaðarøkið fer at skapa menning á øðrum økjum, enn vit eru von við. Verður tørvurin á grundstykkjum til ídnaðarendamál størri enn nevnda lendi, ber helst til at víðka um økið.

Fólkatalið

Tað er natúrligt samband ímillum byggivirksemi innan sethúsaøkið og fólkavøkstur í kommununum. Sum nevnt frammanfyri, er áhugin fyri at seta búgv í Sørvági, Bø og Gásadali stórur. Men tá kommunan ikki hevur havt nóg nógv grundstykkir í útboði, er ikki væntandi at tilflytingin fer at muna í fólkatalinum fyrr enn næstu tvey árini. Í dag búgva 1084 fólk í kommununi.

Fundir hjá bygdarráðnum

Bygdaráðið hevur havt 15 bygdarráðsfundir í 2006. Íalt 263 mál hava verið til viðgerðar.

Nógv virksemi hevur verið í kommununi í árinum, sum nú fer at halla. Væntandi verður ikki minni at gera í 2007. Hetta setur sera stór krøv til okkum, sum ráða fyri borgum.Vón mín er, at vit sum bygdarráð fara inn í nýggja árið við sama virkisfýsni, sum vit saman hava víst í tí farna.

Skattaprosentið hækkaði

Uttan iva vóru fleiri, sum ikki roknaðu við, at skattaprosentið hjá okkum fór at hækka fyri árið 2007. Tað eru helst fleiri, sum vilja hava eina frágreiðing um, hví so er.

Landsstýrið lækkaði sítt skattaprosent fyri 2006 við *einum* prosenti. Hetta árið yvirtóku kommunurnar raksturin av barnaverndunum. Samstundis gav Landsstýrið kommununum møguleika at hækka sítt skattaprosent fyri 2006 við *einum* prosenti. Tá valdi Sørvágs kommuna ikki at hækka skattaprosentið, soleiðis, sum fleiri kommunur gjørdu, men tók yvir raksturin av barnaverdini, har landið áður hevði goldið mest sum alt, uttan at hækka kommunuskattin.

Sørvágs kommuna hevur avgjørt at hækka barnafrádráttin í kommunuskattinum úr 3.000 til 4.000 kr, umframt at geva systkinafrádrátt fyri børn, sum ganga í barnagarðinum. Yvirtøka av barnaverndarøkinum, systkinaavsláttur í barnagarðinum og hækkan av barnafrádráttinum í kommunuskattinum hava ein meir kostnað við sær fyri kommununa. Hesin kostnaður verður helst varandi. Samanlagt ger hetta árliga raksturin dýrari.

Fyri at hava skilagóða javnvág ímillum inntøkur og útreiðslur í rakstrinum av kommununi, mettu vit tað tí verða skilagott at hækka skattaprosentið við 0,75 prosentum. Í mun til aðrar kommunur í Føroyum liggur okkara skattaprosent ájavnt við eina miðal kommunu.

Roknskapurin 2005



Grannskoðaði roknskapurin fyri 2005 varð góðkendur á fundi hin 29. mai 2006
Nettoskattainntøkurnar í 2005 vóru samanlagt kr. 25.489.180.
Rakstrarútreiðslurnar kr. 18.553.632 og gjørdar vóru íløgur fyri samanlagt kr. 10.216.676, tvs. at samlaðu nettoútreiðslurnar vóru kr. 28.770.308.
Størsta einstaka rakstrarútreiðslan var til barnaansing og frítíðarskúla svarandi til uml.
3,8 mió. kr.

Árið 2006 er serliga merkt av íløgum í nýggjan barnaansingarstovn, egningarmiðstøð, reinsiverk og keyp av nýggjum sløkkiliðsbili.

Fíggjarætlan 2007

Fíggjarætlanin fyri árið 2007 varð endaliga samtykt á bygdarráðsfundi hin 29. november 2006.

Samsvarandi ætlanini eru inntøkurnar frá persóns- og partafelagsskatti mettar til samanlagt kr. 25,2 mió. og er hetta áleið tað sama, sum varð mett fyri 2006.

Skattaprosentið verður broytt til 20,50% og barnafrádrátturin hækkaður til kr. 4.000 kr.

Persónsskatturin higartil í ár samsvarar við metingina.



Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2007 er ætlanin at gera íløgur fyri uml. 23 mió. og eru hesar íløgur í høvuðsheitum:

Nýggj útstykking sethús:	kr. 3.900.000
Byggibúning ídnaðarøki:	kr. 2.300.000
Vetrarfriðing:	kr. 1.700.000
Vatnveiting:	kr. 1.063.000
Vegagerð o.a.:	kr. 4.200.000

At enda

Tá hugt verður eftir upphæddunum fyri íløgur á fíggjarætlanini fyri 2007, síggja vit, at íløgurnar eru rættiliga stórar. Veksur virksemið í landinum framhaldandi, er vandi fyri, at kostnaðurin at gera íløgur hjá kommununi verður óneyðuga høgur. Verður tað so, er bygdarráðið sinnað at tálma í íløguætlanin. Tað er skylda okkara at fáa so nógv fyri hvørja krónu sum gjørligt.
Vit væntaðu, at flogvøllurin fór at verða útbygdur í 2006, men so varð ikki. Útlit eru til, at útbyggingin byrjar einaferð í 2007 – kanska í 2008. Tá fer byggivirksemið í okkara kommunu at økjast nógv. Hetta kann fáa ávirkan á tøku arbeiðsmegina í oynni, og sam-stundis økja um kostnaðarstøðið í kommununi. Verður hetta galdandi, eiga vit at fara varligari fram í fíggjarmálum.

Aftur í ár eru tað fleiri, sum á ymiskan hátt eru rakt av sorg og ólukku. Tykkum minnist vit við djúpari samkenslu, við bøn um, at Harrin má styrkja tykkum.

Nú vit gloppa hurðina inn í nýggja árið, eiga vit at taka lógvatak saman um okkara nærumhvørvi, bæði sum kommunalur myndugleiki og sum einstaklingur, soleiðis, at ongin innan fyri okkara kommunumark, dettur niður ímillum. Vit eru ymisk, men vit hoyra tó saman. Havið í huganum, at eydna er so nógv. Hon kann ikki metast í krónum og oyrum eina. Hon er so nógv annað. Latið okkum virka fyri, at vit øll eru tilvitað um, at vit hoyra til onkustaðni, ikki minst til Sørvágs kommunu!

Nú ríður um snarið
at árið er farið
tá sólin aftur rísur
hon nýggja gøtu vísir
eitt nýtt ár okkum bíðar
við 365 blonkum bløðum
sum fyllast við okkara søgum

At enda vil eg vegna bygdarráðið ynskja tykkum øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár við tøkk fyri tað brátt farna.
Gott nýggjár øll somul.
Sørvágur, tann 30. desembur 2006

Vinarliga
Sørvágs Kommuna

Jákup Suni Lauritsen

Bygdaráðsfundir í 2006

Sørvágs Kommuna hevur ásett føstu almennu fundirnar fyri 2007. Fundirnir verða kl. 18:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni hesar dagar:

Mikukvøldið	31. januar
Mikukvøldið	28. februar
Hóskvøldið	29. mars
Hóskvøldið	26. apríl
Mikukvøldið	30. mei
Mikukvøldið	27. juni
Mikukvøldið	05. september
Mikukvøldið	26. september
Mikukvøldið	24. oktober
Mikukvøldið	14. november
Mikukvøldið	28. november
Mikukvøldið	12. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu, verða lýstir í svørtutalvu við kommunuskrivstovuna.

------ o ------

Um tú ætlar at brenna bál nýggjársaftan, er neyðugt at søkja um loyvi frá Sørvágs kommunu. Tlf 21 05 04 innan 31. desember klokkan 12.00.

Treytirnar fyri at fáa loyvi eru hesar:

- at bert reinur og turrur viður verður nýttur.
- at veðrið er til vildar.
- at økið verður ruddað skjótast gjørligt dagin eftir.
- at navnsnevndur ábyrgarpersónur verður uppskrivaður hjá kommununi.

Hesar treytir skulu tryggja, at bálbrenningin verður gjørd við skynsemi, umframt at minst møgulig umhvørvisárin standast av brenningini.

Sørvágs Kommuna

Varðagøta 8
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 33 20 04

Fax. +298 33 29 52
www.sorvag.fo
sorvag@sorvag.fo